[redacted]

Fra: Martin Næs <martinmagnusnaes@gmail.com>
Sendt: 7. november 2022 09:06
Til: Annika Smith; Armgarð Weihe
Emne: Fwd: Áminning: Limafundur verður í kvøld, 4. november, kl. 19

Góðu Annika og Armgarð.

Fyri eini tíð síðan fekk eg lógaruppskotið um nýggja bókasavnslóg sendandi umvegis Rithøvundafelagið, samstundis sum kallað varð inn til limafundar um uppskotið.

Eg fekk ikki møtt á limafundinum fríggjakvøldið, men sendi viðmerkingina niðanfyri til teirra.

Við hesum sendi eg tykkum báðum eisini hesa viðmerking.

Vinaliga

Martin

---------- Forwarded message ---------
Fra: Martin Næs <martinmagnusnaes@gmail.com>
Date: fre. 4. nov. 2022 kl. 10.33
Subject: Re: Áminning: Limafundur verður í kvøld, 4. november, kl. 19
To: Rithøvundafelag Føroya <rit@rit.fo>, Arnbjørn <arnbjornd@mail.fo>

Góðu tit í Rithøvundafelagnum.

Tíverri fái eg ikki møtt til limafundin í kvøld.
Eg haldi, at hetta, á mangan hátt, er eitt fínt lógaruppskot, og her eru nógvar góðar ábøtur, sum eg fegnist um.

Havi bara eina viðmerking og tað er til § 22,2 viðvíkjandi bókasavnsgjaldinum.

Skilji ikki hesa broyting. Eingin skilagóð grund verður nevnd sum orsøk fyri at broyta hetta. Hetta er ein tann mest sosiala lógargreinin í føroyskum lógarverki, og so snýr hon seg um okkara hjúnafelagar. Er orsøkin til broytingina tann, at Landbókasavnið ikki klárar at umsita hetta, so mugu tey spíla seg meira út, ella biðja eitt felag sum Rithøvundafelagið hálpa sær við at útvega teir neyðugu upplýsingarnar.

Sum yrkisfelag kann Rithvøundafelagið ikki taka undir við hesi broyting.

Vinaliga

Martin Næs

Martin Næs

Den fre. 4. nov. 2022 kl. 05.40 skrev Rithøvundafelag Føroya <rit@rit.fo>:
>
> Góði limur
>
>
> Vit skulu minna á, at Rithøvundafelagið bjóðar til limafundar í Hans Andriasar húsi, undir Pisuvarða 2, í kvøld, fríggjakvøldið 4. november 2022 kl. 19.00.
>
> Á skránni til fundin er:
>
> 1. Viðgerð av uppskotinum um nýggja bókasavnslóg, sum er sent felagnum til hoyringar, við freist at svara 8. november.
>
> 2. Helgi Rasmussen greiðir frá luttøku á debutantskeiðnum á Biskops-Arnö í summar.
>
> 3. Arnbjørn Ó. Dalsgarð greiðir frá fundi í Norðurlendska rithøvunda- og týðararáðnum, NFOR, sum varð hildin í Oslo í september.
>
> 4. Ymiskt
>
> Møtið fjølment.
>
> --
> Rithøvundafelag Føroya
> Undir Pisuvarða 2
> 100 Tórshavn
> Faroe Islands
>
> www.rit.fo